# THERON SUM BOND-GENTA


*Charlize Theron er ættað úr Suðurafrika, og hon hevur áður vunnið ein Oscar fyri síni avrik sum filmssjónleikari*

Sjónleikarin Charlize Theron hevur fingið ein leiklut í nýggja James Bond-filminum í boði. Tað skrivar bretska blaðið Daily Mirror. Nýggi fimur um 007 eitur Casino Royale, og saman við einum loyniligum agenti sum Bond hoyra eisini konufólk. Nógvar kendar kvinnur hava spælt við í filmunum um James Bond, og tann nýggjasta Bond-gentan kann fara at gerast suðurafrikanska Charlize Theron, sum áður hevur vunnið ein Oscar.

– Hon er glamourøs, men eisini ein framúr góður sjónleikari. Tað hevði verið sera gott fyri filmin, um hon vildi spæla við, sigur ein kelda í filmsfelagnum, sum framleiðir Bond-filmarnar við Daily Mirror.

James Bond skal í nýggja filminum spælast av Daniel Craig, og Martin Campbell skal leikstjórna.


*Charlize Theron hevur spælt vi› í nógvum kendum filmum, og nú er hon upp á tal sum Bond-genta. (Myndir: Scanpix)*

## ROCKY AFTUR Í RINGIN




Uptøkurnar til nýggja filmin um boksaran Rocky Balboa eru nú farnar í gongd, og nú sum fyrr er tað sjónleikarin Sylvester Stallone, sum skrivar og leikstjórnar. Fyrsti filmurin um Rocky kom í 1976, og hann vann eina Oscar. Síðani blivu filmarnir rættiligir undirhaldsfilmar, og punktum var sett fyri røðini fyri nógvum árum síðani. Nú fer Rocky aftur í ringin eina seinastu ferð, og 59 ára gamli Stallone er í góðum formi til hetta, verður sagt.

*(Mynd: Scanpix)*

## CAREY RÆDDIST IKKI KULDAN




Meðan fólk í London ballaðu seg inn í húgvur, handskar og heit klæði, var tað heilt øðrvísi við Mariah Carey, sum kom á vitjan í Oxford Street í London sunnudagin. Hon skuldi signera nýggju fløguna hjá sær í einum handli, og hon var í stuttum kjóla og vísti bæði búk og armar. Amerikanska sangstjørnan visti væl um kuldan í London, men ein stjørna er eisini ein stjørna í kulda.

*(Mynd: Scanpix)*

## HILTON VIÐ NÝGGJARI BÓK




Amerikanska Paris Hilton, sum er arvingur til Hilton-fyritøkuna, dugir annað enn at spæla býtt í sendirøðini Simple Life. Hon skrivar eisini bøkur, og nú um dagarnar avdúkaði hon nýggju bók sína, sum kallast Your Heiress Diary. Paris Hilton legði leðina fram við í einum handli á Times Square í New York, har hon signeraði bókina til nakrar av sínum hepnu fjepparum.

*(Mynd: Scanpix)*

